# Djúpvatnsflotin kann fara fy




*Tað hevur gingið hampiliga væl hjá Sjagakletti, sum í síni tíð varð keyptur úr Íslandi. Men gongdin hjá lemmatrolarum er sum heild vánalig – og partvís vónleys*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Tá viðurskifti broytast so fullkomiliga, sum við øktu oljuprísunum, er neyðugt, at allir partar viðvirka til at finna loysnir, so vinnan kann halda fram, sigur reiðarin og nevndarlimurin í felagnum Lemmatrolarar, Mikkjal Hammer**

FISKIFLOTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mikkjal Hammer er reiðari á lemmatrolaranum Sjagakletti, sum P/F Sjagaklettur í Hvalba eigur. Teir, sum eiga hetta partafelag, er felagið P/F Steintór, sum eisini eigur lemmatrolaran Steintór. Ein triði lemmatrolari er eisini í Hvalba. Tað er Niels Pauli, ið var hin fyrsti, sum kom til bygdar. Niels Pauli kom sum nýbygningur í 1983. Teir, ið eiga skipið, eru í fyrsta lagi menninir, sum eru knýttir at hesum skipi.

Umframt at vera reiðari, er Mikkjal Hammer eisini nevndarlimur í felagnum hjá Lemmatrolarum, har hann eisini hevur sitið sum formaður.

### Vánalig úrslit

Tá ið grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe legði fram sína árligu roknskapargreining yvir fiskiskipaflotan fyri árið 2006 – við útlitum fyri árið 2007, sást, at lemmatrolarar samanlagt hava havt eitt lítið avlop á rakstrinum. Hetta avlop liggur um einar 2 miljónir krónur tilsamans, men roknað yvir allan hendan bólkin, er hetta einki at tosa um.

Við uppí søguna hoyrir, at nøkur av hesum skipum hava klárað seg so nøkulunda, meðan fleiri hava klárað seg illa og hava negativ tøl á botnlinjuni.

Mikkjal Hammer sigur, at í løtuni eru tvey av teirra skipum á Tórshavnar Skipasmiðju til umvælingar. Tey eru Steintór og Sjagaklettur.

Niels Pauli er til fiskiskap.

Fyri at fáa fulla greiði á, hvørji tey 13 skipini í bólkinum hjá lemmatrolarum eru, kunnu vit upplýsa, at umframt hvalbiartrolararnar, eru Rankin, Rasmus Effersøe, Suðringur og Phoenix heimahoyrandi á Tvøroyri, Sunbeam og Beinisvørð í Vági, Brestir og Eydna (gamli Vesturvarði) í Havn og Vesturskin og Vesturleiki (gamli Beinir) í Sørvági.

Í seinastuni hevur ljóðað, at okkurt av hesum skipum er lagt - og okkurt er lýst til sølu, men Mikkjal Hammer sigur seg ikki vilja gera viðmerkingar til hetta.

- Tað er rætt, at okkurt av hesum skipum er lýst til sølu, og í øðrum føri eru skip til umvælingar.

Hann vísir á, at Rankin liggur og ger ymiskar umvælingar, og í Vági verða nýggju skipini í løtuni riggaði til fiskiskap.

### Oljan tyngjandi

- Tað er greitt, at støðan hjá lemmatrolarum er vánalig og í løtuni rættiliga óviss, nú oljuprísirnir eru vorðnir so høgir. Tey størru skipini brúka stívliga 6.000 litrar av olju um samdøgnið og tey smærru slakar 5.000 litrar. Hetta svarar til ávikavist 1,8 miljónir litrar og 1,3 miljónir litrar um árið – ella úr 5 miljónum krónum upp í einar 7 miljónir krónur í olju um árið.

Mikkjal vísir á, at teir størru lemmatrolararnir fiska fyri stívliga 20 miljónir krónur um árið – og tey smærru fyri einar 14 miljónir krónur.

- Soleiðis fer oljan avstað við umleið einum triðingi av veiðivirðinum hjá hesum skipum, og tað gongur ikki í longdini, leggur hann aftrat.

Hann sigur, at oftast roynist ein partur av árinum vánaligur, men ymiskt er, hvør árstíðin er.

- Vit kunnu ikki beinleiðis siga, hvør tíð roynist ringast, men tá ið árið er úti, hava vit sum oftast havt eina tríggjar mánaðir, har feløgini, sum eiga hesi skipini, noyddust at rinda pening út av lummanum fyri, at skipini kundu loysa.

Mikkjal sigur, at soleiðis fer oljan avstað við væl meira enn einum triðingi av veiðivirðinum hjá hesum skipabólki skiftandi tíðir av árinum.

- Hetta hendir, tá ið fiskiskapurin er vánaligur, og fiskaprísirnir fella. Um summarið eru fleiri virkir stongd, eins og tørvurin á arbeiðsfólki í framleiðsluliðnum kann ávirka møguleikarnar hjá virkjunum at keypa fiskin fyri líkinda prís – eisini aðrar tíðin av árinum.

Eitt, sum bæði feløg, ið eiga skip, fiskakeyparar og fiskaútflytarar hava funnist at í seinastuni, er flutningurin av fiskavørum úr Føroyum.

- Tað vísir seg, at henda